# Pars Pro Toto



UMMÆLI
*Jóna K. Thomsen*

listastevna føroya 2001

Tey, ið leitaðu sær niðan í Norðurlandahúsið sunnukvøldið at síggja ballet, munnu óivað hava sitið eitt sindur bilsin undir framførsluni hjá Pars Pro Toto. Har vóru ongir balletskógvar og einki Corps de ballet ið hvítum klæðum. Hetta kemst av, at talan er um nakað heilt annað enn ballet, navnliga Modern, ella Contemporary, ein dansiháttur ið kom fram í 50`inum og sum hevði uppruna í eini andsøgn mótvegis balettini og tí formligheit ið var partur av henni. Og her er eitt hav av muni, bæði í teknikki og framførsluhátti.

Á palli vóru tvey fólk, íslendska dansarinnan Lára Stefansdóttir og tónleikarin Guðni Franzson, og saman framførdu tey trý stykkir sum Stefansdóttur hevur koreograferað í samstarvi við Franzson. Stefanson er balletvand, hevur dansað hjá ”Islendsku National ballettini” síðan hon var sjey ára gomul og er í dag ein av teimun tíggju føstu dansarnum í kompaníðinum, ið hoyrur til skúlan. Hon hevur luttikið í einum havi av framførðslum á tjóðarsjónleikarahúsinum í Íslandi og aðrastaðni og vann í juni 2001 fyrstu virðisløn í Helsinki fyri sítt koreografiarbeiði. Sjálvt um ballet altíð hevur verið primervenjingin á íslendska balletskúlanum, framføra tey nú bert contemporary koreografiðir, sum tann ið víst var sunnukvøldið.

Ólíkað balettini, sum oftast hevur ein lítlan her av dansarum á palli í senn, er minimalisma í nógv størri mun eitt eyðkenni fyri Modern/Contemporary ballet, og hetta sást eisini aftur í Pars Pro Toto. Har var ein einkul palluppsetan, ein tónleikari ið eisini virkaði sum partur av koreografiini og bert ein dansari sum ofta var akkompagnieraður av bert einum ljóðføri sum tónleikarin spældi á ”live,” ella ógvusligum ljóðum vid einklum rútmum undir.

Fyrsta framførslan byrjaði vid at salurin varð heilt myrkalagdur og úr myrkrinum hoyrdist eitt ógvusligt brøl. Sum pallljósini spakuliga tendraðust, sást ein maður ið spakuliga lyfti eitt skáp upp at standa, meðan hann brølaði, og ein kvinna við langum ljósum flættum sat vid rygginum til áskoðaran. Spakuliga fór hon at røra seg, og bleiv dámurin sum frá leið aggresivur og, aftur við reydligum palljósum og klæðum, eitt sindur erotiskur.

Hetta stykkið kallast Langbrók og er tað úr Njáls Saga, um Hallgerður Langbrók, ein tann best kenda kvinnan í íslenskum bókmentum. Søgan, ella kanska meir kvinnan, kann samanberast vid okkara Beintu. Langbrók var vøkur og vís, gift tríggjar ferð, og lótu allir menn hennara lív.

Væl sást í dansinum at talan var um kvinnu ið hevði vald og vildi lokka, men eisini sást kvinna ið strembar ímóti einum kvinnu ideali. Hetta sást serliga at enda, tá skápið var vent við og ein holað kvinnumynd kom til sjóndar, sum dansarin dansaði inn ímóti, og síðani legði seg nærum naknan frammanfyri. Eitt evni ið líka so væl kann vera tikið úr dagsins samfelag sum úr hundrað ára gomlum bókmentum.

Næsta framførsla var ein klarinett solo ið Guðni Franzson framførdi afturvið teldu, og seinasta framførsla var kallað ”Lady Fish and Chips.” Í hesum dansi vera tríggjar yrkingar nýttar sum tveir vælkendir íslendskir yrkjarar hava skrivað, Jónas Hallgrímsson, yrkjari úr 19. øld og kendur sum romantikari, og rithøvundurin Jónas Árnason.

Henda framførslan byrjar við at Franzson kemur á pall spælandi á australska rørljóðførið Didgerydoo. Síðan kemur dansarin inn við einum bunti av langum grasi í hvørjari hond, sum hon í bláum kjóla dansar ógvuliga róliga og flótandi við, til hon á gólvinum hevur gjørt ein ring av grasi, sum hon síðani dansar rundan um og inni í.

Eftir hetta skiftir Franzon ljóðføri og spælur títtari og meir áleypandi tónar, meðan hann sparkar grasið úr ringinum. Nú kemur Stefanson inn aftur í reyðum kjóla, og dansurin broytist til títtari og meir discoteque kendar rørslur sum hon framførir við einum: ”Á eg eri deilig og kool” bráði, ið fær láturin fram í áskoðaranum. Fyrst tí tað líkasum yvirhøvur ikki passar til undanfarna dámin á framførsluni, og síðan tí tað er sum ein parodi á fólk í dansi eitt leygarkvøld tá kenningin er meir enn passalig og sjálvsálitið í topp.

Í hesum stykkinum síggjast tvær ymiskar lýsingar av kvinnuni, fyrsta til kærleiksyrkingina hjá Hallgrímsson úr 19. øld, har dámurin er róligur og leinktandi, seinna til yrkingina hjá Árnason, ið livdi til 1995, har vit hava meir nútímans rørslur og eitt sjálvsikkurt og meir komiskt brá.

Framførðslan hjá Pars Pro Toto var avgjørt verd at síggja. Afturvið eini spennandi lýsing av kvinnu og mentan fingu vit flótandi og sterku rørslunar hjá Láru Stefansdóttir at síggja. Hennara teknikkur er á sera høgum støði, og ein varð fangaður av sterku og sjálvtilvitaðu útstráling hennara. Sigast kann, at íslendsku røtur hennara koma til sjóndar í listini hon skapar. Myrkur, vindljóð, tungur dramatikkur og sterkar kenslur, innilæstar fyri síðani at bróta út, lúrdi undir allari framførsluni, og fær hetta ikki ein at hugsa um íslendsku náttúruna?

Spell at ikki fleiri slíkar framførslur koma hendan vegin, ið kunnu hugkveikja tey, ið vilja hugkveikjast. Dansur er eisini mentan, kanska í elsta hami av øllum, og hann nýtist hvørki at vera á tá ella í ring.

*Jóna K. Thomsen er næmingur á The Place, London Contemporary Dance School*



# Stórarbeiðið er byrjað



*Svimjihøllin í Klaksvík er stongd, nú stóra umvælingararbeiðið í høllini er farið í gongd*

**Nú er svimjihøllin í Klaksvík stongd, og hon letur neyvan upp aftur í ár. Stórar umvælingar skulu gerast í høllini**

UMVÆLINGAR
*Eyðun Klakstein*

Nú er stóra umvælingararbeiðið í svimjihøllini í Klaksvík byrjað. Tað er felagið Kanjon, sum skal taka sær av hesum arbeiðnum, og væntandi fer arbeiðið at taka tað mesta av hesum árinum.

Svimjihøllin í Klaksvík er í ringum standi, og skuldi høllini verða lív lagað, so var neyðugt við umfatandi umvælingum av høllini.

Fyrsti parturin av arbeiðnum verður at skifta takið á høllini, og tornið, har hava kavihylurin er, skal takast burtur. Framyvir verða tað ongar lopfjalar í svimjihøllini í Klaksvík.

### Hægri enn metingin

Tá arbeiðið varð boðið út vóru ta bara tvey byggifeløg, sum lótu tilboð inn, og hesi tilboð vóru væl hægri, enn kostnaðarmetingin var.

Kanjon gav tilboð upp á knappar átta milliónir, meðan Klaksvíkar Byggivirkið fór upp um átta milliónir. Tekniska umsiting hjá býráðnum hevur síðani samráðst við Kanjon, og úrslitið er, at arbeiðið verður gjørt fyri einn nakað lægri kostnað, enn upprunaliga tilboðið var.

### Eingin svimjing

Meðan hetta arbeiðið fer fram, verður svimjihøllin stongd, og tað merkir, at hvørki almenningurin ella svimjifelagið Ægir sleppa fram at í høllini, sum næstu mánaðirnar verður at rokna sum eitt byggipláss.

Høvuðsvenjarin hjá Ægir, Søren Olsen, sigur, at felagið kemur í eina trupla støðu, tí meginparturin av arbeiðnum hjá felagnum kemur at liggja stilt næstu mánaðirnar, og tað kann fara at kosta felagnum nógv.

# Neyðugt við ymiskum treytum



*Arbeiðsgevarar mugu hava møguleikan at fáa rokning fyri gjaldið til barsilsskipanina, meðan løntakarar avgreiða sín part, samstundis sum teir fáa løn.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Meðan løntakarar gjalda hvørt oyrað til barsilsskipanina, samstundis sum teir fáa løn, hava arbeiðsgevarar longri freist at syrgja fyri sínum gjaldi. Soleiðis er neyðugt at hava skipanina, sigur aðalstjórin í Fíggjarmálastýrinum**

BARSILSSKIPANIN
*Eyðun Klakstein*

Fríggjadagin gjørdi landsstýrismaðurin við fíggjarmálum av, at arbeiðsgevarar skulu hava longri freist at gjalda til barsilsskipanina, og teir skulu ikki órógvast av smáum gjøldum og høgum avgreiðslugjaldi.

Hendan skipan er tó ikki galdandi fyri vanliga løntakaran, sum skal gjalda hvørt oyrað til skipanina, samstundis sum hann fær løn.

Aðalstjórin í Fíggjarmálastýrinum sigur, at tað er neyðugt at geva arbeiðsgevarum valmøguleikan millum eina automatiska gjaldsskipan og at fáa rokning.

– Tað ber ikki til at fara inn á eina konto hjá arbeiðsgevarunum eftir gjaldinum, og tí mugu teir sjálvbodnir fáa eina automatiska gjaldsskipan í lag. Tá talan er um vanliga løntakaran, so verða skattur og onnur avgjøld tikin av, áðrenn pengarnar koma á konto, sigur Petur Alberg Lamhauge.

Tí er munur millum arbeiðsgevarar og løntakarar í barsilsskipanini og í øðrum avjgaldsskipanum hjá tí almenna.

### Taka gjald

Løgtingslógin um barsilsskipan varð lýst 3. apríl í ár. Hetta er ein skipan, sum gevur foreldrum møguleikan at fáa løn í barsilstíðini.

Høvuðsreglan í lógini er, at landskassin skal bera kostnaðin av barsilspengunum, men til lutvísa fígging av hesi skipan, kann landskassin krevja eitt gjald.

Hetta gjald er álagt løntakarum og arbeiðsgevarum, og tað er 0,25 prosent av A-inntøkuni.

Í grein 19 í lógini stendur, at gjaldið fellur til gjaldingar, samstundis sum lønin verður goldin. Hetta er eisini galdandi fyri løntakaran, sum avgreiðir sítt gjald til barsilsskipanina saman við skatti, ALS-gjaldi og annað.

Sambært lógini eiga arbeiðsgevarar eisini at gjalda sítt gjald beinanvegin, men í kunngerðini frá 31. mai fáa arbeiðsgevarar møguleikan at geva Toll- og Skattstovuni fulltrúð til at taka barsilsgjaldið av kontoini ella at fáa rokning fyri gjaldið.

Verður seinni møguleikin nýttur, so er gjaldsfreistin sjey dagar.

### Avgreiðslugjaldið

Men hóast arbeiðsgevarar hava fingið ein gjaldsskáa, vóru teir sera misnøgdir, tá teir fingu rokningina fyri gjaldið til barsilsskipanina.

Ein orsøk til misnøgdina var, at freistin at gjalda bara var sjey dagar, og hin orsøkin var, at eitt avgreiðslugjald upp á 100 krónur var lagt oman á rokningina, sum hjá nógvum arbeiðsgevaraum bara var nakrar krónur.

Hetta avgreiðslugjaldið er ikki at finna í kunngerðini frá 31. mai, men hinvegin í eini kunngerð, sum verður lýst 5. juli. Har verður avgreiðslugjald skoytt uppí upprunaligu kunngerðina.

Men rokið um gjaldsfreistina og avgreiðslugjaldið hevði við sær, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum legði uppí. Fríggjadagin gjørdi hann av, at avgreiðslugjaldið skal strikast aftur, og arbeiðsgevarar skulu hava longri gjaldsfreist.

Harafturat verður nú eitt sokallað bagatellmark lagt inn í skipanina, so arbeiðsgevarar ikki verða órógvaðir av tí almenna, fyrr enn teirra partur kemur upp um 50 krónur.

Aðalstjórin í Fíggjarmálastýrinum heldur, at besta og einfaldasta loysnin hjá arbeiðsgevarum er tó, at teir geva fulltrúð til, at pengarnir kunnu takast av kontoini beinanvegin.

– Gjaldið er so lítið, at tað er lítil og eingin kredittur í at fáa rokning. Hinvegin lættir tað um hjá øllum pørtum, at gjaldið verður avgreitt beinanvegin, sigur Petur Alberg Lamhauge.

# Eldrasambýlið reist

**Nevndin fyri sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku er fegin um, at bæði kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri byggingina er á góðari leið**

ELDRABYGGING
*Eyðun Klakstein*

Í dag verður reisigildi í Klaksvík. Orsøkin er, at nýggja eldrasambýlið undir Kráarbrekku er reist.

Seinastu mánaðirnar hevur arbeiðið undir Kráarbrekku gingið væl, og nevndin fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku sigur seg fegnast um, at byggingini á leið fylgir løgdu kostnaðarmetingini og tíðarætlanini.

Fyrsta byggistigið av verkætlanini undir Kráarbrekku er í trimum pørtum, og sáttmálar eru gjørdir fyri allar hesar partar.

### Liðugt komandi summar

Fyrsta uppgávan var at gera økið byggibúgvið, og síðani varð farið undir sjálva byggingina av einum bygningi til 16 búfólk. Í hesum sambýli verða eisini felagshøli og annað til búfólkið.

Tað er hesin bygningurin, sum nú er reistur, og gongst sum æltað, kann hann takast í nýtslu móti summri komandi ár.

Umframt sambýlið skulu 24 eldraíbúðir eisini gerast, og hetta arbeiðið byrjar fyrsta dagin. Eldraíbúðirnar skulu væntandi verða lidnar fyri árslok komandi ár.

Stórur áhugi hevur verið fyri eldraíbúðunum, og nógv fólk standa á bíðilista.